## Sir Alex vil hava Hargreaves

Hóast Bayern München alla tíðina hevur sagt, at teir ikki vilja selja, so hevur Manchester United støðugt sýnt áhuga fyri sterka miðvallaranum, Owen Hargreaves. Spælarin sjálvur hevur eisini sagt, at hann fegin vil til Old Trafford at spæla, og nú er aftur møguleiki fyri einum skifti. Manchester United hevur nú boðið 125 mió kr. fyri spælaran, og so er spurningurin, um Bayern tekur av hesaferð, men hetta tykist tó ósannlíkt, halda týskir miðlar.

## Wilbek er ársins coach

Nú danska manslandsliðið í hondbólti fyrireikar seg til HM-endaspælið í Týsklandi, er tað við einum nýggjum steypi í hondini. Venjarin hjá liðnum, Ulrik Wilbek, er nevnliga júst kosin sum besti coach í donskum ítrótti. Wilbek hevur í fleiri ár prógvað, hvussu týdningarmikil sálarfrøðin er í kappingarítrótti, og tað er fyrst og fremsti evni hansara at arbeiða við hesum, sum hevur ført nýggja heiðurin við sær.




# Jan skal fáa TB upp í tann stuttliga endan

**Nýggi TB-venjarin er sinnaður at lata tvøramenn sleppa at standa sína roynd, áðrenn hann fer at leita eftir fleiri útlendingum**



*Nýggi venjarin, Jan Nielsen, vinstrumegin, og Jóan Petur Olgarsson, formaður í TB, taka lógvatak eftir at undirskriftin er sett á nýggjan sáttmála. Nú er endamálið at fáa TB fram í fremstu røð*

FÓTBÓLTUR
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Tey, sum standa á odda fyri Føroya elsta fótbóltsfelag, hava ikki havt so nógv at fegnast um seinastu árini.

TB hevur stríðst í næsbestu fótbóltsdeildini í mong ár og hóast tað onkuntíð hevur verið tætt við, hevur tað ongantíð eydnast at býta seg fast í bestu deildina.

Men tey hava ongantíð dult fyri, at tey arbeiða við hond og fót fyri at fáa TB upp aftur ímillum tey bestu.

Og nú vóna tey at hava funnið mannin, sum kann megna lyfta TB upp í Formuladeildina.

Hósdagin skrivaðu TB undir eitt árs venjarasáttmála við Jan Nielsen úr Danmark.

Hann kennur ikki nógv til føroyskan fótbólt. Men frá venjarastarvi í Danmark, kennir hann brøðurnar Óla og Jón Johannesen, sum báðir hava spælt niðri og teir báðir hava í mong ár verið stuðlar á TB liðnum.

### Hugburðurin er tann rætti

Sjálvur er venjarin eitt sindur varðin við at lovað ov nógv.

– Endamálið er púra greitt og tað er liggja í oddinum, tá ið kappingin er av, sigur hann.

Men um tað fer at eydnast er torført at siga, tí hann kennir onki til hini liðini og hann kennir heldur ikki spælararnar hann hevur til taks, uttan teir báðar veteranarnar, Johannesen brøðurnar.

Men uppskriftin til tað hevur hann longu í høvdinum.

– Vit ætla at stýra spælinum. Eg vil fegin, at mítt lið skal hava bóltin nógv í einum dysti og tað fari eg at vita, at TB hevur góðar spælarar í hópinum og tá ið eg hitti spælarar og stjórn í TB, nú eg var í Føroyum og skrivaði undir sáttmálan, virkaðu øll rættiliga miðvís í tí, tey ætlaðu. Tað virkar, sum um bjartskygni er stórt og at tað er ein veruligur vilji til at røkka á mál og tað var ógvuliga postivt at merkja, sigur hann.

– Annars havi eg fingið at vita, at TB hevur góðar spælarar í hópinum og tá ið eg hitti spælarar og stjórn í TB, nú eg var í Føroyum og skrivaði undir sáttmálan, virkaðu øll rættiliga miðvís í tí, tey ætlaðu. Tað virkar, sum um bjartskygni er stórt og at tað er ein veruligur vilji til at røkka á mál og tað var ógvuliga postivt at merkja, sigur hann.

### Lokalir fáa møguleikan

TB hevur nú fingið nýggjan málverja úr Serbia.

Men at fáa fleiri útlendskar spælarar til Tvøroyrar er ikki tað fyrsta, venjarin hugsar um.

– Tá ið eg komi aftur til Føroyar 1. februar, byrja vit heilt av nýggjum. Og eg eri avgjørt sinnaður at geva spælarunum, sum longu eru í hópinum, ein veruligan møguleika at vísa, hvør dugur er í teimum, áðrenn vit fara uttanlands at leita eftir spælarum.

– Fyri hvønn útlending, vit fáa til Tvøroyrar, verður tað ein annar í hópinum, sum missur plássið á liðnum. Men vísir tað seg, at vit kortini mangla spælarar á ávís pláss, skulu vit fyrst hava gjørt okkum púra greitt, hvat vit hava brúk fyri. Tí skulu vit hava vissu fyri, at ein spælari, vit fáa uttanífrá er betri enn ein, vit hava frammanundan, sigur Jan Nielsen.

– Men í fyrstu atløgu eri eg sinnaður at vita, hvat vit fáa burturúr teimum spælarum, vit longu hava og at geva teimum ein veruligan møguleika at bíta seg fastar í liðið, áðrenn vit leita aðrastaðni eftir leikarum, leggur hann afturat.

**Hondbóltsstøður**

**Sunset-kappingin**

| | d | v | - | j | - | t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Neistin | 0 | 0 | - | 0 | - | 0 | 217 | 164 | 53 | 7 |
| 2 Stjørnan | 0 | 0 | - | 0 | - | 0 | 199 | 161 | 38 | 6 |
| 3 VB | 0 | 0 | - | 0 | - | 0 | 180 | 199 | -19 | 4 |
| 4 Kyndil | 0 | 0 | - | 0 | - | 0 | 187 | 215 | -28 | 2 |
| 5 StÍF | 0 | 0 | - | 0 | - | 0 | 178 | 222 | -44 | 2 |

**Atlantic Airways-kappingin**

| | d | v | - | j | - | t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 VÍF | 0 | 0 | - | 0 | - | 0 | 304 | 272 | 32 | 9 |
| 2 StÍF | 0 | 0 | - | 0 | - | 0 | 279 | 267 | 12 | 7 |
| 3 Neistin | 0 | 0 | - | 0 | - | 0 | 321 | 297 | 24 | 6 |
| 4 Kyndil | 0 | 0 | - | 0 | - | 0 | 273 | 272 | 1 | 4 |
| 5 KÍF | 0 | 0 | - | 0 | - | 0 | 261 | 284 | -23 | 3 |
| 6 H71 | 0 | 0 | - | 0 | - | 0 | 269 | 315 | -46 | 3 |

**Flogbóltsstøður**

**Meistaradeild kvinnur**

| | d | v | - | t | v sett | t sett | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 ÍF | 12 | 9 | - | 3 | 31 | 21 | 10 | 11 |
| 2 TB | 12 | 8 | - | 4 | 28 | 14 | 14 | 10 |
| 3 Dráttur | 12 | 8 | - | 4 | 29 | 22 | 7 | 9 |
| 4 SÍ | 12 | 7 | - | 5 | 26 | 22 | 4 | 8 |
| 5 KÍF | 12 | 2 | - | 10 | 19 | 30 | -11 | 2 |
| 6 Mjølnir | 12 | 2 | - | 10 | 9 | 33 | -24 | 2 |

**Meistaradeild menn**

| | d | v | - | t | v sett | t sett | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 ÍF | 9 | 8 | - | 1 | 24 | 12 | 12 | 9 |
| 2 Mjølnir | 9 | 7 | - | 2 | 24 | 12 | 12 | 8 |
| 3 Fram | 9 | 4 | - | 5 | 16 | 20 | -4 | 4 |
| 4 Fleyr | 10 | 3 | - | 7 | 15 | 23 | -8 | 4 |
| 5 SÍ | 9 | 1 | - | 8 | 14 | 26 | -12 | 1 |